# Oskar Jensen 102 ár

Tað er so sjáldan, at fólk fylla meira enn 100 ár, at tað eigur at vera umrøtt, tá ið tað hendir.

Men hetta hendi í gjár 18. august, tá ið Óskar Jensen fylti 102 ár. Hóast hann "bert" er hálvur føroyingur skal hann fáa eina heilsan frá okkum.

Søgan hansara er í stuttum, at pápin Jens Fredrik Jensen var úr Skopun. Hann var sonur Janus hjá Dímunar Jóannes. Hann er tískil í ætt við Jens í Dali, sum vit umrøddu seinast í røðini Hendur ið Sleptu og við Margretu, gift við Georg Lindenskov, sum vit umrøða nú hósdagin. Vit hava havt og fara at hava aðrar greinir um hesa stóru ætt.

Eina ferð Jens Frederik við skipi kemur inn á Ísafjørðin, hittir hann gentu haðani. Tey giftast og fáa 9 børn. So doyr mamman. Pápin veit sær ikki onnur ráð enn at lata fimm av børnunum fara til Føroyar at vera. Eitt av hesum børnum var Oskar. Hann kom saman við beiggja sínum Napoleon at vera hjá Sigmundi á Argjum í Dr. Jacobsensgøtu. Men seinni kom hann til Julianna og Tummas Askham, sum búðu við Landavegin. Heima hjá Askham kom hann at vera sum ein av familjuni. Tað verður hann enn roknaður fyri at vera! Oskar kom í prentaralæru á Dimmalætting, og 19 ára gamal fór hann aftur til Íslands. Hann tosar heilt væl føroyskt, hóast tað eru meira enn 80 ár síðani, hann fór aftur til Íslands. Fleiri av hansara beiggjum blivu verandi í Føroyum. Napoleon flutti til Suðuroyar. Vigant búði í Klaksvík og Salli í Lovík.

Vit báðir koma at kennast meira at kalla av tilvild. Tordur Niclassen á Eiði hevði fleiri ferðir greitt frá, at hann plagdi at vitja ein gamlan føroying, Oskar Jensen, tá ið hann var í Íslandi.

Hetta gav eitt gott høvi at fara at



*Óskar Jensen. Myndin er tikin á 102 ára føðingardegnum*

vitja Óskar. Hetta var ein spennandi og hugtakandi vitjan. Óskar var og er framvegis sera áhugaður fyri tí, sum hendi í Føroyum. Úrslitið gjørdist eisini, at hansara áhugaverda lívssøga kom í FF-blaðið. Hon skal ikki endurtakast her, men áhugað kunnu fara inn á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo gamla heimasíðan, blað nr. 369.

Føroyar vóru eisini umboðaðar á føðingardegnum, sum varð hildin sunnudagin. Umboð fyri føroyska sjómansheimið vóru inni á gólvinum. Tey vóru stjórin Jóan Karl Høgnesen og Jens Petursson, sum í eitt mannaminni hevur verið formaður í nevndini. Teir láta at, at Óskar er væl fyri, og hann hevur sítt fulla skil. Óskar letur heilsa heima í Føroyum!

Vit vilja ynskja hesum gamla kappanum tillukku við hansara kempualdri.

**ó.**



*Her boksast Óskar á 102 ára degnum við sín besta vin á ellisheiminum, Carlos Soto. Myndirnar hevur sonur Óskar, Ómar Óskarson tikið*

# Andrias C. Samuelsen til minnis

Tíðin hjá mær sum virkisleiðari er langt síðani farin, men tey árini eg starvaðist við hesum, fall tað ofta í mín lut at seta fólk í starv á virkinum. Í flestu førum eydnaðist hetta væl, og mong eru tey starvsfólk í Grannskoðaravirkinum, bæði núverandi og fyrrverandi, sum eg minnist aftur á við bæði gleði og virðing.

Ein av teimum sum kom í starv hjá okkum sum grannskoðari fyri um leið 30 árum síðani var Andrias Samuelsen. Hann fall væl til á arbeiðsplássinum, bæði mótvegis sínum arbeiðsfeløgum og teim viðskiftafólkum, hann kom at røkja. Andrias var sera dámligur, hevði lætt við at koma út av tí við fólk, samstundis sum hann var sera dugnaligur. Hann arbeiddi ógvuliga sjálvstøðugt og var sera arbeiðssamur. Hann hongdi seg seg ikki í klokkutíðir, men gjørdi sítt arbeiði liðugt, og ongatíð fór ein til fánýtis til hansara við eini arbeiðsuppgávu.

Hann hevði hugflog, og ynskti eisini at útbúgva seg nakað meira og fór tí í áttatiárunum niður til Danmarkar at arbeiða og lesa til HD. Hann búsettist tá í Hirtshals og arbeiddi í nøkur ár á Føroya Fiskasølu í Hirtshals. Men í kreppuárunum, tá



fleiri føroyingar fóru av landinum kom Andrias og familjan heim aftur. So mikið væl hevði honum dámt á Grannskoðaravirkinum, at hann ynskti at koma aftur har, og hann var eisini vælkomin. Har starvaðist hann so restina av síni tíð, til hann nú legði árarnar inn bert 61 ára gamal.

Sum arbeiðsfelagi kom eg at kenna Andrias væl. Vit hava loyst manga arbeiðsuppgávuna saman, tað ein serliga minnist er tann menniskjansliga síðan av manninum. Hvussu blíður hann altíð var, hansara ynski um altíð at gera sítt besta og ongatíð at lata frá sær nakað hálvgjørt verk. Tað eru átta ár síðani eg gavst á Grannskoðaravirkinum. Men fyrstu árini aftaná kom eg av og á inn á gólvi hjá teimum. Har hitti eg sjálvandi eisini Andrias. Fyri fýra árum síðani flutti eg uttanlands, so síðani tá havi eg bert fylgt við frástøðu. Sjúkan kom snýkjandi inn á hann, men seinastu tíðina havi eg skilt, at hon veruliga fekk valdið á honum. Tað hevur verið ein tung tíð, bæði fyri hann og hansara avvarðandi, konu og døtur og abbabørn. Men eg havi skilt, at hann eisini nú bar lagnuna við tolsemi, sama tolsemi, sum eisini var hansara sermerki í hansara bestu manndómsdøgum.

Tað er við takksemi og virðing eg minnist mín góða vin og arbeiðsfelaga Andrias Samuelsen, og má Harrin, sum var hansara álit, styrkja tykkum, sum eftir sita. Tey góðu minnini kann eingin taka frá tykkum.

**Jógvan Sundstein**

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jóanes Mikkelsen**, vanliga nevndur Jóa, úr Syðrugøtu, kemur í Gøtu kirkju týsdagin uml. kl. 15. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14. Tey ið vilja minnast Jóa kunnu lata eina peningagávu til Gøtu kirkju, konto í peningastovnunum.

**Herdis Katrin Debes**, fødd Vestergaard, í Sumba, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum, sunnudagin, 45 ára gomul.

**Turið Sólbjørg Olsen í Søldarfirði**, dóttir Sonju og Pidda, andaðist leygarkvøldið 19 ára gomul. Kistan fer úr heiminum í kirkjuna týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju mikudagin kl. 14. Tey ið ynskja at minnast Turið kunnu lata Barnadeildini og Reiðrinum eina gávu, konta í Føroya Banka.

**Jana Vinnersted, í Slagslunde**, fødd Ørvarodd av Sandi, andaðist 18. august, 59 ára gomul.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Marjun Lamain**

doyði og var jarðað.

Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri góð og troystarík orð.
Tøkk til sangarar úr Nólsoy
Tøkk til Berg Jacobsen, prest, fyri minningarhald
í Samuelskirkjuni.
Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til øllum
tykkum, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Randi, Turið, Zacharias og Jona**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá ið systir okkara

**Jana Johannesen**
Skála

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Frits Thomsen og Jónsvein Bech, prest, fyri
góð orð í Sambýlinum og í kirkjuni.
Hjartans tøkk til starvsfólk í Eldrasambýlinum á
Skála fyri góða røkt og umsorgan.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Sambýlið.
Tøkk fyri hjálp í sambandi við jarðarferðina og
til tykkum mongu, sum fylgdu Janu til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Erhard, Hjalmar og Gretha**